inni - trygt og ómaksleyst til hús



**Stór sethús – Jóan Paula Gøta 5, Kollafjørður**

Stóru húsini, ið eru sera sterkt og væl bygd, eru í 3 hæddum. Niðasta hædd og miðhæddin eru 141 fermetrar hvør og ovasta hædd er uml. 120 fermetrar - í alt uml. 402 fermetrar. Grundøkið er 972 fermetrar. Byggiár: 1980. Í niðastu hædd er inngongd, hall, goymslurúm, vaskirúm við egnari inngongd og fýrrúm / kjallararúm / garaga. Í miðhæddini er trappugongd / hall / garderoba, køkur / alrúm, borðstova / stova, millumgongd og 2 kømur, millumgongd, hjúnarrúm við útgongd til altan, baðirúm og 2 kømur. Í ovastu hædd er trappugongd / alrúm, skot og 2 stór loftsrúm. Húsini standa í vøkrum, veðurgóðum og barnavinaligum umhvørvi. Spæliplláss / fótbóltsvøllur er beint við, sera gott útsýni er út yvir fjørðin og gott busssamband er. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



**Sethús - Skáltavegur 17, Klaksvík**

Húsini eru í 3 hæddum - samlað búvídd 126 fermetrar. Hartil er ein hjallur á 15 fermetrar og ein arbeiðsskúrur á 15 fermetrar. Grundøkið er 465 fermetrar. Byggiár: 1959. Húsini eru høvuðsumvæld 2000/07 m.a. er taki, timburklædningurin, ketil/-oljufýring, kaminan, fleiri vindeygu og hurðar, el, rør og ymiskt annað skift og túni omanfyri er lagt við grót flísum. Húsini eru stoypt heilt upp, og klødd við timbur. Í miðhæddini er durur, gongd, køkur/- stova. Í ovastu hæddini er, gongd, hjúnarrúm 2 kømur og baðirúm. Í niðastu hæddini er kontór (kamar), vaskirúm og fýrrúm. Húsini standa niðanfyri vegin, hava góðan sólargang, og sera gott útsýni. Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.



**Sethús – Garðagøta 7, Miðvágur**

Húsini eru í 2 hæddum hvør á 100 fermetrar - í alt 200 fermetrar. Grundøkið er 453 fermetrar. Byggiár: 1969: Húsini eru dagførd so við og við. Í erva er terassa, inngongd, gongd / garderoba, matarkøkur, stova, hjúnarrúm, baðirúm, 2 kømur og goymslurúm / kovi. Í neðra er inngongd, durur / gongd, kamar, vaskirúm / kjallararúm, goymslurúm / fýrrúm og goymslurúm. Harafturat er hjallur á uml. 5 m2. Húsini standa í veðurgóðum, friðarligum og barnavinaligum umhvørvi við góðum útsýni og garður / urtagarður er runt húsini. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



**Sethús – Varðabú 18, Tórshavn**

Húsini eru í 2 hæddum - samlað búvídd uml. 180 fermetrar. Grundøkið er 431 fermetrar. Byggiár uml. 1950. Húsini eru høvuðsumvæld í 1990'unum har m.a. vindeyguni, tak, oljufýr og baðirúmini eru gjørd av nýggjum. Annars eru húsini dagførd og sera væl hildin. Í erva er køkur við spísikróki, 3 stovur, wc, gongd og altan. Í neðra er gongd, 2 kømur, hjúnarrúm við baðirúm, vaskirúm, klæðnarúm, fýrrúm og baðirúm. Hartil er ein amboðsskúrur. Húsini standa væl fyri við endaveg og hava góðar parkeringsmøguleikar. Møguleiki er fyri at byggja uppí húsini, og tekningar fylgja við.



**Sethús – Vágsvegur 84, Vágur**

Húsini eru í 2 hæddum hvør á uml. 140 fermetrar - í alt 280 fermetrar. Grundøkið er 196 fermetrar. Byggiár: 1911. Í neðra er inngongd, gongd, køkur, stova, kamar, nýtt baðirúm, arbeiðsrúm og fýrrúm. Í erva er trappugongd, 3 kømur, baðirúm, goymslurúm, arbeiðshølir, gongd og altan. Húsini standa miðskeiðis í býnum í veðurgoðum umhvørvi. Prísuppskot: kr. 350.000,00.

Sosialurin 341800

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01

inni



# Starvsfólk til Investment Banking

Kaupthing Bank sóknast eftir einum starvsfólki til deildina Investment Banking.

Tú verður partur av toyminum, sum seinastu árini hevur fyrireikað og staðið fyri flestu keypum og sølum av føroyskum fyritøkum.

Vit vænta, at tú ert ein framsøkin, kreativur og arbeiðssamur persónur. Talan er um rættiliga nýtt virksemi í Føroyum, so tær nýtist ikki at hava royndir við Investment Banking.

Vit vænta hinvegin, at tú hevur eina viðkomandi búskaparliga útbúgving, virkisanda og ikki minst ein brennandi áhuga fyri at finna fyritøkur við góðum sølubæri. Tú skalt finna keyparar og seljarar og fyrireika tilgongdina fyri partarnar. Tú skalt hava eitt vakið eyga við búskapinum í føroyskum fyritøkum og teimum virðum, sum tær skapa. Tú letur teg ikki ræða av stórum avbjóðingum og loysnum, sum liggja uttanfyri vanliga føroyska siðvenju.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Kristian Petersen, deildarstjóra, á telduposti kristian.petersen@kaupthing.com ella á telefon 551505/351505.

Umsóknir skulu í seinasta lagi 18. mai 2007 vera okkum í hendi.

Kaupthing Bank
Bókbindaragøta 8
Postboks 3090
FO-110 Tórshavn

samsit.fo

Kaupthing Bank er ein norðurevropiskur banki við deildum í øllum norðurlondum, Luksemborg, Sveis, Stórabretlandi og USA. Umleið 3000 fólk starvast hjá Kaupthing Bank.

KAUPTHING BANK